

# Oljuprísurin hevur ikki verið so lágur í meir enn tíggju ár

**Jógvan Hugo Gardar**

21.12.2015 - 12:41

Oljan.fo

Oljuprísurin hevur farnu vikuna lækka støðugt, og hann heldur fram at lækka í morgun.

Í løtuni vísur Nasdaq-yvirlitið at eitt fat av Norðsjóvaroljuni Brent kostar 36,64 dollarar, meðan amerikanska lættoljan WTI kostar 35,85 dollarar fyri fatið.

Fyri bæði oljusløgini er talan um lægsta prísin í meir enn tíggju ár. Greinarar sum fylgja oljumarknaðinum eru farnir at tosa um ein oljuprís sum kann nærkast 20 dollarum fyri fatið.